# **Støðismeting** av heilsurøktaranæmingum

Næmingurin skal hava frumrit av støðismetingini og skúlin skal hava **avrit** av øllum skjølum, tá starvsvenjingin er **liðug.** Starvsvenjingin sendir skúlanum metingina, helst í teldutøkum formi, annahvørt skannað inn ella sum PDF-fíl (ið ikki kann broytast í). Telduskrivað undirskrift verður tá góðtikin. Um næmingurin fær metingina teldutøka, er sama krav til skjalið.

| **Set x:** | **Starvsvenjing I:** | **Starvsvenjing II :** | **Starvsvenjing III:** |
|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Navn:** | **Dato:** |
| **Starvsvenjingarstað:** | |

**3 samrøður eru kravdar tilsamans í hvørjari starvsvenjing:**

Væntanarsamrøða
Miðvegis metingarsamrøða*
Endalig metingarsamrøða*
*Sí kunning um samrøðurnar í Námskipanini

Skúlin skal kunnast, um fráveran fer upp um 10%.

**Taksonomi í heilsurøktaraútbúgvingini:**

**Í starvsvenjing I** skal næmingurin hava **vitan um** *(begynder) sum merkir**:**
Kend støða. Samansettur aktivitetur verður loystur við vegleiðing. Kennir til grundleggjandi vitanar- og førleikaøki.
Persónligt: Mennir ábyrgd og grundarlag fyri framhandaldi læring. Leggur grund undir sjálvbjargni í uppgávuloysn.

**Í starvsvenjing II** skal næmingurin til miðvegis vegleiðandi hava **hegni til** *(rutineret) sum merkir:
Rutinukend støða.Uppgávan verður planløgd og gjøgnumførd í rutinukendari støðu. Næmingurin loysir ein trupulleika. Kann sjálvstøðugt seta seg inn í meira samansettar trupulleikastøður.
Persónligt: Vísir fleksibilitet og evni at umstilla seg. Loysir uppgávur sjálvur og í samstarvi.

**Í starvsvenjing III skal næmingurin hava førleika til** *(avanceret) sum merkir:
Kendar og framkomnar støður. Næmingurin kann meta um ein trupulleika. Planleggur, loysir og útynnur sosialar og fakligar uppgávur.
Persónligt: Tekur sjálvstøðugt ábyrgd. Vísir initiativ. Leggur dent á kvalitetsans og skapanarevni.

***Sí kunning um uppgávur í starvsvenjing í bók: Praktikbogen til sosu-assistent**
**ISBN:** 9788762818897

**Næmingurin keypir bókina í útbúgvingini.**

## Væntanarsamrøða HRØ starvsvenjing: I □ II □ III □

Grundarlag fyri samrøðuni er væntanarbræv frá næminginum og fakligu og persónligu málini fyri útbúgvingina. Um næmingurin hevur verið í starvsvenjing fyrr skal støðismeting frá seinastu starvsvenjing takast við til væntanarsamrøðuna. Vegleiðarin skal hava avrit av metingini.

**Faklig mál:**

| |
|---|
| |

**Persónlig mál (eru flættaði inn í fakligu málini og kurlurnar):**

| |
|---|
| |

| | |
|---|---|
| **Samrøða hildin tann** | **Starvsvenjingarstað:** |
| **Næmingur:** | **Vegleiðari:** |

| **MIÐVEGIS METING** av heilsurøktaranæmingi, starvsvenjing I □ II □ III □<br><br>**Navn:**<br><br>**Dato:** **Starvsvenjingarstað:**<br><br>**Taksonomi:**<br>Starvsvenjing I, næmingurin fær **kunnleika** til at:<br>Starvsvenjing II, næmingurin fær **hegni** til at:<br>Starvsvenjing III, næmingurin fær **førleika** til sjálvstøðugt at: | Onga leið komin | Ávegis | Komin væl ávegis | Komin sera væl ávegis |
|---|---|---|---|---|
| 1. Næmingurin dugir at greiða úr hondum og grunda yvir sjúkrarøktargerðir, undir hesum at nýta sjúkrarøktartilgongdina sjálvstøðugt til at savna saman upplýsingar, eyðmerkja, greina, leggja til rættis, fremja og eftirmeta sjúkrarøkt til borgarar / sjúklingar við grundleggjandi tørvi. | | | | |
| 2. Næmingurin dugir at leggja til rættis og seta í gongd heilsufakligar gerðir, Við støði í fakligum og kliniskum metingum, undir hesum kanningaramboðum (skreening) hjá Heilsustýrium, fyri tíðliga at varnast broytingar í hilsustøðuni, havandi lokalar mannagongdir og leiðreglur í huga. | | | | |
| 3. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at eyðmerkja og seta tiltøk í verk, um heilsustøðan broytist hjá borgara/sjúklingi. Har óvæntaðir og torgreiddir spurningar taka seg upp, dugir næmingurin at geva sjúkrarøkt innan fyri sítt starvsøki og sjúkrarøkt, sum hann hevur fingið ábyrgd fyri (delegerað), undir hesum at veita palliativa røkt. | | | | |
| 4. Næmingurin dugir at síggja heildina og stuðla borgaranum/sjúklinginum at megna lívið og við hesum sum mál at arbeiða sjálstøðugt og saman við borgaranum/sjúklinginum fyri, at hann kann endurmennast og koma fyri seg (recovery). | | | | |
| 5. Næmingurin dugir sjálvstøðugt og tvørprofessionelt at arbeiða heilsufremjandi, út frá einari heildarfatan fyribyrgja lívsstílssjúkur, við at vegleiða og eggja borgaran/sjúklingin til at megna lívið. | | | | |
| 6. Við endurmenning sum mál, dugir næmingurin sjálvstøðugt at leggja til rættis, geva og eftirmeta umsorgan, praktiska hjálp og persónliga røkt til borgarar við kropsligum, sálarligum og sosialum tørvi. | | | | |
| 7. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at leggja til rættis og seta í verk kropsligt, socialt, mentanarligt og skapandi virksemi og at kunna vegleiða um virksemistilboð, eisini at taka netverk og sjálvboðin við, í mun til áhuga og tørv borgarans, og stuðla borgarum/sjúklingum í sjálvir at velja. | | | | |
| 8. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at forða fyri smittuspjaðing út frá galdandi leiðreglum og fyrisettum mál fyri reinføri, undir hesum serliga avtalaðum mannagongdum og arbeiðsháttum, og dugir at vegleiða borgarar, sjúklingar, avvarðandi, starvsfelagar og sjálvboðin um hetta. | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 9. Næmingurin dugir sjálvstøðugt, sambært leiðreglum og delegation á starvsvenjingarstaðnum at handfara heilivág, eygleiða og skjalfesta árin og hjáárin og samstarva við borgara/ sjúkling um heilivágssviðgerðina. | | | | |
| 10. Næmingurin dugir at skapa sambond við fólk, soleiðis, at samstarv kann koma ílag við borgara / sjúkling, avvarðandi og sjálvboðin, og at samskifta málrættað og nýta hóskandi samskiftishættir. | | | | |
| 11. Næmingurin dugir sjálstøðugt at seta í verk námsfrøðiligt virksemi og at taka sær av at vegleiða starvsfelagar. | | | | |
| 12. Næmingurin dugir at samskifta soleiðis, at atlit verður tikið til trygdina hjá sær sjálvum og øðrum, og at stuðla sjálvræðisrætt og sjálvsavgerð borgarans / sjúklingsins í mun til ósemjur og harðskap. | | | | |
| 13. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at samskifta og skjalfesta fakligar gerðir í viðkomandi skjalfestingarskipanum fyri at tryggja, at sjúklingagongdir eru samanhangandi í samlaðu borgara / sjúklingagongdini og fyri, at borgari / sjúklingur í størri mun merkir dygd. | | | | |
| 14. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at samskipa og leggja til rættis sítt egna og arbeiðið hjá øðrum og stuðla undir og vera við í toymissamstarvi, sum hevur at gera við at loysa uppgávur hjá borgara / sjúklingi sambært málum hansara. | | | | |
| 15. Næmingurin dugir at samskipa og vera við í samstarvinum tá borgarin / sjúklingurin hevur brúk fyri tvørprofessionellum og tvørgeiraligum átaki, og dugir sjálvur at byrja, enda og skjalfesta eina almanna- og heilsufakliga veiting, sum hevur við móttøku, innlegging, útskriving og heimkomu at gera. | | | | |
| 16. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at veita sjúkrarøkt og nýta tøkni og leiðreglur, sum taka støði í vitan og evidensi. | | | | |
| 17. Næmingurin dugir at stuðla menningini av góðum atburði í mun til dygdartrygging og sjúklingatrygd í tvørprofessionella samstarvinum. | | | | |
| 18. Næmingurin dugir at vera vandin og stuðla undir menning av arbeiðsumhvørvi, sum er fysiskt og sálarliga gott, undir hesum eisini gera flytingar og meta um plássviðurskifti, sum lúka arbeiðsumhvørvisreglur, og nýtslu av vælferðartøkni. | | | | |
| 19. Næmingurin dugir at grunda yvir og velja neyvt í etiskum og fakligum tvístøðum, sum standast av arbeiðnum sum professionellur heilsupersónur, til dømis í sambandi við tagnarskyldu, at nýta makt, sjúklingarættindi, umsorganarskyldu og fyrilit fyri lívsgóðsku borgarans / sjúklingsins. | | | | |
| 20. Næmingurin dugir at tilrættisleggja og greiða frá um egið arbeiðs- og førleikaumráði sum løggildur heilsupersónur sambært viðkomandi lóggávu og førleikaøki hjá øðrum. | | | | |

## Miðvegis metingarsamrøða HRØ – starvsvenjing I □ II □ III □

**Navn:**

**Starvsvenjingarstað:** **Dato:**

**Samlað skrivlig meting:**

| |
|---|
| |

**At arbeiða víðari við:**

| |
|---|
| **Fakliga:** |

| |
|---|
| **Persónliga:** |

| | |
|---|---|
| **Samrøða hildin hin** | |
| **Næmingur:** | **Vegleiðari:** |

<table>
<tr><td>ENDALIG METING av heilsurøktaranæmingi, starvsvenjing I □ II □ III □<br><br>Navn:<br><br>Dato: Starvsvenjingarstað:<br><br>Taksonomi:<br>Starvsvenjing I, næmingurin fær kunnleika til at:<br>Starvsvenjing II, næmingurin fær hegni til at:<br>Starvsvenjing III,næmingurin fær førleika til sjálvstøðugt at:</td><td>Avrik, ið als ikki eru nøktandi</td><td>Avrik, ið júst eru nøktandi</td><td>Avrik, ið eru miðal nøktandi</td><td>Avrik, ið eru væl nøktandi</td><td>Avrik, ið eru sera væl nøktandi</td></tr>
<tr><td>1. Næmingurin dugir at greiða úr hondum og grunda yvir sjúkrarøktargerðir, undir hesum at nýta sjúkrarøktartilgongdina sjálvstøðugt til at savna saman upplýsingar, eyðmerkja, greina, leggja til rættis, fremja og eftirmeta sjúkrarøkt til borgarar / sjúklingar við grundleggjandi tørvi.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>2. Næmingurin dugir at leggja til rættis og seta í gongd heilsufakligar gerðir, við fakligum og kliniskum metingum, undir hesum kanningaramboðum (skreening) hjá heilsumynduleikum, fyri tíðliga at varnast broytingar tíðliga , eisini við lokalum mannagongdum og leiðreglum í huga.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>3. Næmingurin dugir sjálstøðugt at eyðmerkja og seta tiltøk í verk, um heilsustøðan broytist hjá borgara/sjúklingi. Har óvæntaðir og torgreiddir spurningar taka seg upp, dugir næmingurin at geva sjúkrarøkt innan fyri sítt starvsøki og sjúkrarøkt, sum hann hevur fingið ábyrgd fyri (delegerað), undir hesum at veita palliativa røkt.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>4. Næmingurin dugir at síggja heildina og stuðla borgaranum/sjúklinginum at megna lívið og við hesum sum mál at arbeiða sjálstøðugt og saman við borgaranum/sjúklinginum fyri, at hann kann endurmennast og koma fyri seg (recovery).</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>5. Næmingurin dugir sjálvstøðugt og tvørprofessionelt at arbeiða heilsufremjandi, út frá einari heildarfatan fyribyrgja lívsstílssjúkur, við at vegleiða og eggja borgaran/sjúklingin til at megna lívið.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>6. Við endurmenning sum mál, dugir næmingurin sjálvstøðugt at leggja til rættis, geva og eftirmeta umsorgan, praktiska hjálp og persónliga røkt til borgarar við kropsligum, sálarligum og sosialum tørvi.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>7. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at leggja til rættis og seta í verk kropsligt, socialt, mentanarligt og skapandi virksemi og at kunna vegleiða um virksemistilboð, eisini at taka netverk og sjálvboðin við, í mun til áhuga og tørv borgarans, og stuðla borgarum/sjúklingum í sjálvir at velja.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>8. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at forða fyri smittuspjaðing út frá galdandi leiðreglum og fyrisettum mál fyri reinføri, undir hesum serliga avtalaðum mannagongdum og arbeiðsháttum, og dugir at vegleiða borgarar, sjúklingar, avvarðandi, starvsfelagar og sjálvboðin um hetta.</td><td></td><td></td><td></td><td></td><td></td></tr>
</table>

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 9. Næmingurin dugir sjálvstøðugt, sambært leiðreglum og delegation á starvsvenjingarstaðnum at handfara heilivág, eygleiða og skjalfesta árin og hjáárin og samstarva við borgara/ sjúkling um heilivágssviðgerðina. | | | | | |
| 10. Næmingurin dugir at skapa sambond við fólk, soleiðis, at samstarv kann koma ílag við borgara / sjúkling, avvarðandi og sjálvboðin, og at samskifta málrættað og nýta hóskandi samskiftishættir. | | | | | |
| 11. Næmingurin dugir sjálstøðugt at seta í verk námsfrøðiligt virksemi og at taka sær av at vegleiða starvsfelagar. | | | | | |
| 12. Næmingurin dugir at samskifta soleiðis, at atlit verður tikið til trygdina hjá sær sjálvum og øðrum, og at stuðla sjálvræðisrætt og sjálvsavgerð borgarans / sjúklingsins í mun til ósemjur og harðskap. | | | | | |
| 13. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at samskifta og skjalfesta fakligar gerðir í viðkomandi skjalfestingarskipanum fyri at tryggja, at sjúklingagongdir eru samanhangandi í samlaðu borgara / sjúklingagongdini og fyri, at borgari / sjúklingur í størri mun merkir dygd. | | | | | |
| 14. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at samskipa og leggja til rættis sítt egna og arbeiðið hjá øðrum og stuðla undir og vera við í toymissamstarvi, sum hevur at gera við at loysa uppgávur hjá borgara / sjúklingi sambært málum hansara. | | | | | |
| 15. Næmingurin dugir at samskipa og vera við í samstarvinum tá borgarin / sjúklingurin hevur brúk fyri tvørprofessionellum og tvørgeiraligum átaki, og dugir sjálvur at byrja, enda og skjalfesta eina almanna- og heilsufakliga veiting, sum hevur við móttøku, innlegging, útskriving og heimkomu at gera. | | | | | |
| 16. Næmingurin dugir sjálvstøðugt at veita sjúkrarøkt og nýta tøkni og leiðreglur, sum taka støði í vitan og evidensi. | | | | | |
| 17. Næmingurin dugir at stuðla menningini av góðum atburði í mun til dygdartrygging og sjúklingatrygd í tvørprofessionella samstarvinum. | | | | | |
| 18. Næmingurin dugir at vera vandin og stuðla undir menning av arbeiðsumhvørvi, sum er fysiskt og sálarliga gott, undir hesum eisini gera flytingar og meta um plássviðurskifti, sum lúka arbeiðsumhvørvisreglur, og nýtslu av vælferðartøkni. | | | | | |
| 19. Næmingurin dugir at grunda yvir og velja neyvt í etiskum og fakligum tvístøðum, sum standast av arbeiðnum sum professionellur heilsupersónur, til dømis í sambandi við tagnarskyldu, at nýta makt, sjúklingarættindi, umsorganarskyldu og fyrilit fyri lívsgóðsku borgarans / sjúklingsins. | | | | | |
| 20. Næmingurin dugir at tilrættisleggja og greiða frá um egið arbeiðs- og førleikaumráði sum løggildur heilsupersónur sambært viðkomandi lóggávu og førleikaøki hjá øðrum. | | | | | |

## Endalig metingarsamrøða heilsurøktaranæmingur – starvsvenjing I □ II □ III □

**Navn:**

**Starvsvenjingarstað:**

**Samlað skrivlig meting:**

**Hvat skal serliga arbeiðast víðari við:**

**Fakliga:**

**Persónliga:**

**(set kross ):**

| Dato: | Staðið |
|---|---|
| | Ikki staðið |

**Frávera / tal av døgum:**

**Næmingur:** **Vegleiðari:**

Næmingurin skal hava frumrit av støðismetingini og skúlin skal hava **avrit** av øllum skjølum, tá starvsvenjingin er **liðug.** Starvsvenjingin sendir skúlanum metingina, helst í teldutøkum formi, annahvørt skannað inn ella sum PDF-fíl (ið ikki kann broytast í). Telduskrivað undirskrift verður góðtikin tá tað verður sent við adressuni hjá starvsvenjingarstaðnum. Um næmingurin fær metingina teldutøka, er sama krav til skjalið.

# Vegleiðing um meting av støði

**7-talpróvstigin**

til flokkar byrjaðir í septembur 2013 og framyvir

| | **Miðvegissamrøðan** | |
|---|---|---|
| **Støðan hjá næminginum** | **Orð, ið lýsa støðið hjá næminginum:**<br>**Taksonomi skal umhugsast, sí framsíðuna.** | **Støðan –**<br>(Næmingurin skal ikki hava talmet, bert skrivliga meting) |
| **Onga leið komin**<br>Ikki staðin. | Hevur als ikki ment seg ella víst nakra framgongd<br>Kann ikki fara í holt við<br>eina uppgávu, ið er áløgd,<br>Skilur ikki nágreiniliga vegleiðing nóg væl.<br>Skilur ikki mannagongdir. | Fyri heilt vánaligt avrik og fyri ikki nøktandi avrik.<br>Vegleiðandi 03 og 00 |
| **Ávegis** | Hevur ment seg nakað og víst eina ávísa framgongd<br>Skal framvegis hava nógva vegleiðing.<br>Kann fara í holt við eina uppgávu, ið er áløgd<br>Skilur ávísar mannagongdir. | Fyri nøktandi avrik.<br>Vegleiðandi 02 |
| **Komin væl ávegis** | Hevur ment seg rættuliga væl og víst framgongd<br>Megnar oftast sjálvstøðugt at fara í holt<br>við eina uppgávu, ið er áløgd.<br>Klárar seg við partvísari vegleiðing<br>Skilur málini og mannagongdir. | Fyri meðal og gott avrik.<br>Vegleiðandi 4 og 7 |
| **Komin sera væl ávegis** | Hevur ment seg sera nógv og víst rættiliga góða framgongd.<br>Vegleiðing er neyðug í ávísum førum, fyri at menna seg framhaldandi.<br>Kann sjálvstøðugt fara í holt við eina uppgávu.<br>Skilur mannagongdir.<br>Fer sjálvstøðugt í holt við eina uppgávu.<br>Skilur málini og dugir mannagongdir. | Fyri sera gott avrik ella framúr gott avrik.<br>vegleiðandi 10 og 12 |
| | Framhald..... | . |

| | **Endalig støðismeting** | |
|---|---|---|
| **Støðan hjá Næminginum** | **Orð, ið lýsa støðið hjá næminginum: Taksonomi skal umhugsast, sí framsíðuna.** | **Støðan - talmet** |
| **Avrik, ið als ikki eru nøktandi Ikki staðin.** | **Eitt ivasamt og ófullfíggjað avrik, ið ikki kann góðtakast**. Næmingurin hevur avmarkaðan ella ongan førleika og vitan. Ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini. Skilur ikki vegleiðing og hevur ilt við at skilja raðfestingar og hvat er neyðugt at gera í tí dagliga arbeiðinum í mun til krøvini í málunum. Dugur ikki at tilrættisleggja. Kann ikki arbeiða sjálvstøðugt í nóg stóran mun. Hevur ilt við at samstarva. Megnar ikki at halda gjørdar avtalur. | Fyri heilt vánaligt avrik og ikki nøktandi avrik. Vegleiðandi: 03 - 00 |
| **Avrik, ið júst eru nøktandi** | **Eitt avrik, ið júst kann góðtakast**. Næmingurin hevur hampuligan førleika og vitan. Skilur vegleiðing, lýkur krav um at raðfesta og skilur hvat er neyðugt at gera í tí dagliga arbeiðinum. Dugur at tilrættisleggja arbeiðið, soleiðis at dagligar uppgávur verða loystar, lýkur akkurát krøvini í málunum. Kann arbeiða sjálvstøðugt. Tekur av og á stig til samstarv. Megnar at halda gjørdar avtalur. | Fyri toluligt avrik. Vegleiðandi: 02 |
| **Avrik, ið eru miðal** | **Eitt gott ella miðal avrik, ið væl kann góðtakast.** Næmingurin hevur rúman førleika og vitan. Skilur vegleiðing og dugur at raðfesta og leggja tilrættis vanligt arbeiðið í mun til krøvini í málunum. Kann arbeiða sjálvstøðugt og samstarva um uppgávur. Megnar at halda gjørdar avtalur. | Fyri miðal avrik. Vegleiðandi: 4-7 |
| **Avrik, ið eru væl nøktandi** | **Sera gott avrik, við onkrum smávegis lýtum.** Næmingurin hevur holla vitan og førleika, men er merktur av handahógvi (rutinu). Skilur vegleiðing og kennir til raðfestingar og hvat er neyðugt at gera í tí dagliga arbeiðinum í mun til krøvini í málunum. Samstarvar væl við onnur. Arbeiðir sjálvstøðugt. Heldur gjørdar avtalur. | Fyri gott avrik. Vegleiðandi: 10 |
| **Avrik, ið eru sera væl nøktandi** | **Framúr gott avrik, ið mest sum lýtaleyst lýkur krøvini í málunum.** Næmingurin hevur sera holla vitan og førleika. Skilir vegleiðing og kennir til raðfestingar og hvat er neyðugt at gera í tí dagliga arbeiðinum. Arbeiðir sera sjálvstøðugt. Fær gott samstarv í lag. Heldur gjørdar avtalur. Vegleiðing er neyðug í ávísum førum, fyri at menna seg framhaldandi. | Fyri framúr gott avrik. Vegleiðandi 12 |